

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 02 - 2012

# Metstórur áhugi fyri arktisku økjunum

Meðan grønlendski parturin av arktiska økinum ikki í løtuni er eins spennandi og áður, er norski og russiski parturin av arktisk sera áhugaverdur. Varaforsetin í norska oljufelagnum Statoil, Tim Dodson, sigur við danska blaðið Politiken, at við fleiri risa fundum av olju og natúrgassi í Barentshavinum norðanfyri Noreg og Russland, er tað ein sannroynd, at Arktis komandi árinini verður eitt av heimsins størstu oljuøkjum. Arktis verður umráðandi fyri framtíðar oljuveiting, og Barentshavið er lykilin. Um nøkur ár kann Barentshavið veita eina millión tunnur av olju dagliga, sigur Tim Dodson við Politiken. Umframt at hava funnið tvey nýggj og stór oljuøki í Barentshavinum, satsar Statoil eisini upp á at gerast høvuðssamstarvsfelagi við russisk ríkis- olju og gassfeløg, sum hava gjørt stór fund í Polarhavninum. Í roynd og veru hevur áhugin fyri norska og russiska partinum av Arktis ongantíð verið størri. Og tilsamans 37 oljufeløg fara at troyta møguleikarnar í norska sjóøkinum frá 2013, upplýsti norski olju- og orkumálaráðharrin, Ola Borten Moe, á eini ráðstevnu í Tromsø í farnu viku. Millum hesi feløg eru Shell og ExxonMobil, skrivar Politiken. Mynd - Tim Dodson er varastjóri í norska Statoil